

# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 4

Apríl 2010

ISSN [illegible]

*Eplavelta*
Mynd: Maud á Geilini

Tríggjar nýggjar frímerkjaútgávur

Nýggj postgjaldsmerki: "Kappróður"

2010 - árið har plantu- og djórasløg skulu verjast

Vel vakrasta frímerki í 2009

Posta
FAROE ISLANDS













FO 692-695

Royndarprent

# Jens Christian Svabo

Jens Christian Svabo varð føddur í Miðvági í 1746. Pápi hansara, ið var prestur har vesturi, undirvísti sjálvur sonin, til hann sum trettan ára gamal varð upptikin á Latínskúlan í Havn. Har gekk tann ungi Svabo tey næstu seks árini og nam tann grundkunnleika, ið skuldi til fyri víðari lestur.

Saman við einum av vinmonnunum úr Latínskúlanum, Nikolai Mohr (1742-90), fór Svabo í 1765 til Keypmannahavnar, har teir lósu búskaparfrøði og náttúrusøgu. Teir gjørdist sostatt fyrstu føroyingar, ið valdu eina ikki gudfrøðiliga útbúgving. Svabo og Mohr fingu báðir philosophicum prógv í 1769, men hvørgin teirra fekk endaligt prógv frá lærda háskúlanum, helst orsakað av fátækradømi.

Armóðin gjørdist fasti fylgisveinur Svabos lívið á tamb. Í 1770unum tókst hann við ymiskt smáarbeiði til lívsins uppihald, meðan hann arbeiddi við ymsum memoranda og ritgerðum viðvíkjandi betring av føroyskum landbúnaði og búskapi. Bara okkurt av hesum arbeiðinum kom út á prent. Tað er eisini í byrjanini av hesum tíðarskeiðinum at Svabo fór undir at gera eina føroyska orðabók, sum finst í einum avriti frá 1773.

Eftir øllum at døma, søkti Svabo ymisk føst størv í hesum tíðarskeiðinum, men fekk onki. Einasta umsókn frá hansara hond, vit kenna í dag, er viðvíkjandi einum starvi sum fúti í *Smaalenenes Amt* í Noregi. Hann fekk ikki starvið. Harafturímóti fekk hann bjóða gamla starvið hjá tí nýggja fútanum, men noyddist at siga tað frá sær, tí at hann ikki hevði neyðuga fígging.

Tá vinurin Nikolai Mohr noyddist at lata uppgávuna at skriva um føroysk viðurskifti frá sær, fekk Svabo møguleikan at uppfylla dreymin at skriva eina bók um Føroyar. Tann 22. mai 1781 fór Svabo til Føroya, har hann savnaði tilfar um tilfeingi, fólkalív og búskap. Ferðin vardi til 1. september árið eftir.

Í tíðini eftir føroyaferðina, skrivaði J. C. Svabo fleiri rit, ið samanløgd eru eitt stórsligið verk um Føroyar og føroysk viðurskifti seinast í 1700 talinum. Men, orsakað av ósemju í donsku fyrisitingini, varð verk Svabos ikki útgivið. Tað varð ofta nýtt sum keldutilfar til aðrar lýsingar av Føroyum, men varð ikki útgivið sum samlað verk fyrr enn í 1959.



*Pæsastova*, har Svabo livdi síni síðstu ár.
Hann helt til í útbygninginum í ovasta enda av húsinum. Ovasti endin (við einum vindeyga) kallast Svaboes hús. *Mynd: Róði Hansen*

Føroyaferðin 1781-82 gjørdist fíggjarligi mønustingur Svabos. Hann sat í svárari skuld, gjørdist sjúkur og livdi í djúpari armóð í Keypmannahavn í mong ár. Ár 1800 vendi hann heimaftur til Føroya sum ein brotin maður og livdi í fátækradømi til sín deyða í 1824.

Men arvur Svabos til eftirtíðina skuldi vísa seg at verða munandi størri enn hansara syndarliga lagna kundi bent á. Sum tað barn av upplýsingartíðini hann sanniliga var, helt Svabo á við sínum vísindaliga arbeiði. Hann var sannførdur um, at føroyska málinum var ikki lív lagað, og at tað sum fráleið mundi fara at víkja fyri donskum. Fyri at varðveita tað til eftirtíðina, savnaði hann tilfar til eina stórsligna føroyskt-danskt-latínska orðabók. Tað gekk ikki so galið sum Svabo óttaðist, í staðin fyri kom hann at vekja ein akademiskan áhuga fyri føroyska málinum. Hansara orðasavn legði lunnar undir føroyska skriftmálið og tí arbeiði, ið síðan er framt, málinum at frama.

Samstundis við tí reint málsliga arbeiðinum, savnaði Svabo eisini kvæði og vísur. Í handritum hansara finnast 52 kvæði, m.a. tær fyrstu uppskriftirnar av *Karlamagnusar kvæðunum*. Einans eitt av hesum kvæðum kom á prent meðan hann livdi – í einum svenskum vísusavni frá 1814.

Hóast ansurin fyri virkseminum hjá Jens Christian Svabo var lítil og ongin meðan hann livdi, stendur hann í dag sum ein av størstu mentamonnum í Føroya søgu. Kvæðasavnið og orðalistarnir eru ómetaligar kelduskriftir um mál og mentan í 1700 talinum og virka sum ein sjóneyka longur aftur í tíðina. Og verkið um Føroyar gevur eitt breitt innlit í føroyska samfelagið seinast í 1700 talinum. Tann ið lesur verk Svabos situr eftir við kensluni av einum skynsamum og nútímans upplýsingarmanni í einum samfelag, ið illa nokk hevði rist myrku miðøldina av sær.

*Anker Eli Petersen*







FO 696-697 Royndarprent

# Røtur og epli

Røtur eru gamlar í Føroyum og nógv eldri enn eplini, sum ikki vóru vanlig fyrr enn miðskeiðis í 19. øld. Fyrr høvdu tey tvey sløg av rótum, føroyskar røtur (*brassica napus*) og norskar røtur (*brassica rapa*), sum vóru tær vanligu røturnar tá. Tær føroysku røturnar vóru soleiðis háttaðar, at tær vuksu niður í jørðina, so djúpt at tær máttu takast upp við sneis, meðan norskar røtur lógu ovarlaga í moldini, so at tær vóru lættar at taka upp við berum hondum. Rótaveltan var rópt *rótakál*. Røtur vóru yvirhøvur brúktar út í súpan, men vóru eisini etnar afturvið viðskera og døgurðamati eitt nú fugli.

Seinni fóru føroyingar eisini at velta aðrar røtur, eitt nú kálrabi, mairøtur, turnips og gularøtur, tí tá kundi rótafræ keypast í handlunum. Frá umleið 1920 vaks áhugin millum fólk fyri urtagørðum, og tá fóru tey umframt røtur eisini at velta grønmeti av ymiskum slag. Áðrenn eplini komu, so høvdu tey bert røtur afturvið døgurðamatinum. Av eini hvørjari orsøk, so var tað fyrr sera vanligt at stjala røtur. Tey sum veltu røtur royndu tí at krógva tær burtur við at velta sær eitt rótakál inni í eini eplaveltu, so eplaslokkarnar krógvaðu rótakálið.

Í dag selja tey kálrabi, ofta róptar føroyskar røtur í handlunum, men hetta eru røtur úr útlendskum fræði, sum veksur í Føroyum, men umstøðurnar gera, at tær vaksa seg ikki so stórar, tí smakka tær eisini betri.

Eplini komu til Danmarkar fyri fyrstu ferð í 1719. Í Føroyum vita vit um setepli í 1775 og 1799 í Havn, men tað varð ikki fyrr enn miðskeiðis í 19. øld, at tað varð vanligt at velta epli úti á bygd. Nógv mugu hava hoyrt Hans Marius Debes greiða frá, tá tey fyrstu eplini komu til Gjáar í 1835.

At byrja við veltu tey epli sum tey veltu korn og røtur, men skjótt var ryggjaveltan ella hyppiveltan, tað vanliga. Við haka ella spaka gróvu teir eina foru ein góðan fót til dýpdar, koyrdi tøð í og settu so eplini í. Síðani ryggjaðu teir omaná. Í Mykinesi hildu tey leingi, at epli kundu bert veltast á bønum beint omanfyri bygdina, har tað var serliga veðurgott. Hetta kallaðu tey fyri *Kánansland*. Eingin bjóðaði til at velta aðrastaðni, og tey sum ikki átti jørð har, ótu røtur meira enn epli. Hetta broyttist alt, tá flagveltan kom, tí tá vísti tað seg, at epli kundu veltast allastaðni.

Tað vóru kortini støð sum vóru sera væl egnaði til ryggjaveltuna eitt nú *Oyran* í





Myndir: Maud á Geilini



Sørvági og sandurin heima á Sandi og hildið var fram at velta á henda hátt. Ofta veltu tey sama stykki á hvørjum ári. Til hyppiveltuna ella ryggjaveltuna vóru mykjutøð nýtt, og ofta eitt sindur av kunsttøðum afturat.

Sandurin var so mikið djúpur, at tað bar til at goyma eplini í einum eplaholi til útímóti vári. Teir gróvu eitt hóskandi ferhyrnt hol, sum var so mikið djúpt, at frost ongan mun gjørdi. Fyri at eplaholið skuldi verða lætt at finna aftur, teknaðu teir eitt kort av stykkinum og merktu holið á kortið. Eplaholið gjørdi somu nyttu sum eplahúsini av flag, sum meira ella minni vóru grivin niður í jørðina. Fleiri goymdu eisini eplini í kjallaranum, men har skuldi verða kølið, so eplini ikki fóru at næla í ótíð.

Tað kom rættiligt glið á eplaveltingina í Føroyum eftir at ein miðvingur umleið 1925 uppfann flagveltuna, ella reimaveltuna, eisini rópt *vágaveltan*. Tað var ein sera makaleysur veltingarháttur, har tú legði eplið á eina smala reim, sum stóð óloyst eftiri á bønum. Síðani varð flag lagt omaná, so græs kom móti græsi og moldin vendi upp. Hetta eru tær mest vanligu eplavelturnar, sum vit síggja á bønum í dag og nú tykist tað at verða nóg mikið við eini skeið kunsttøðum millum hvørt epli.

Eftir 1925 og ikki minst í teimum fátøku tríatiárunum, komu eplini at fáa stóran týdning í matarhaldinium, tí uttan epli var ein døgurði mest sum einki, sjálvt um tað ikki var talan um annað enn epli og garnatálg.

Í summum bygdum var velt so mikið av eplum, at teir kundu selja epli til aðrar bygdir og onkur ger tað enn nú á Sandi. Eitt nú vóru tað nógv fólk í eini bygd sum Tvøroyri, sum ongan jarðarteigin áttu at velta í, hjá teimum var ikki annað enn at keypa epli. Tey flestu keypa í dag útlendsk epli í handlinum, tað er ómakaleysari, men tað eru eisini nógv fólk, sum finna fragd og gleði í at velta síni egnu epli, sum sjálvandi eru nógv betri enn tey keyptu.

*Jóan Pauli Joensen*







FO 698-699 Royndarprent

# Jólasangir 1

**Klassiskir føroyskir jólasangir**
Øll mentanarøki, har jól verða hildin, hava sínar egnu jólasangir. Teir klassisku jólasálmarnir, ið hava ferðast frá landi til land gjøgnum tíðina, og teir meira staðbundnu klassikararnir, sum beinanvegin vekja jólakensluna í áhoyraranum. Føroyar eru onki undantak. Mongdin av føroyskum jólasangum og sálmum er rúgvismikil, og tey komandi trý árini skulu vit lýsa nøkur dømi.

Vit leggja út við teimum báðum kendastu yrkjarunum av føroyskum barnasangum, Hans Andreas Djurhuus og Alexandur Kristiansen.

**Á barnaárum ungu**
Hans Andreas Djurhuus (1883-1951) er okkara ljósi og fólkakæri tjóðaryrkjari. Hann skrivaði eina ørgrynnu av sangum, har hann lýsti náttúruna, fólkalív og, sum tíðin beyð, tjóðskaparliga sjálvskenslu.

Men tað er serliga ein síða av virki Hans Andreasar, ið gjørdist ein partur av føroysku fólkasálini. Sum lærari og yrkjari, lá tað vælsaktans natúrligt fyri, at hann eisini skrivaði barnasangir. Lættir, jaligir og ævintýrkendir tekstir, ið hava hugtikið børn í fleiri ættarlið og sett sín dám á okkara felags alheim. Prinsessan í Bábylon ella firvaldurin ið vildi giftast við fluguni – jú tey finnast øll onkustaðnis í loynivitskuni hjá hvørjum føroyingi.

Í jólasanginum "*Á barnaárum ungu*", minnist H. A. Djurhuus aftur á barndómsins jól, tá hann sat og spældi sær við jólaljósini. Hann tendraði tey og sløkti, meðan hann bíðaði eftir at kirkjuklokkurnar skuldu ringja jólini inn. Tá klokkurnar fóru at ringja, tendraði hann tey øll, og í glæmunum ímyndaði hann sær tann lítla kongasonin, ið bar ljós og vón til heimin.



*Og ár tey eru runnin.*
*Nú spæla onnur børn sum eg.*
*Tá jólaljósið tendrast,*
*tá vitja minni meg.*

**Lítla fitta nissa mín**

Alexandur Kristiansen er, sum H. A. Djurhus undan honum, ein institutión í føroyskum mentanarlívi og ein av okkara fremstu lýrikarum. Síðan fyrsta yrkingasavnið (*Nón*) kom út í 1968, hevur hann ríkað føroyskar bókmentir við fleiri yrkingasøvnum, umsetingum av stutt- og skaldsøgum og barnabókum.

Alexandur Kristiansen, sum eisini er lærari, hevur hartil skrivað og umsett óteljandi barnasangir. Hansara orðasnildi og kensla fyri málinum, verður løgd í børnini við orðaspæli, rútmiskum uppsetingum og rími – og hansara, ofta margháttligu, figurar eru við tíðini vorðnir ein natúrligur partur av tí føroyska barnaalheiminum.

Tá Alexandur Kristiansen í 1974 ella 75 var í starvsvenjing, skrivaði og umsetti hann fleiri barnasangir til tann 1. flokkin hann arbeiddi við. Millum hesar var umsetingin av danska jólasanginum "*Lille søde nissefar*", yrktur av Kirsten Pendrup, við tónleiki av Gerd Gøssel. Føroyska heitið var "*Lítla fitta nissa mín*", og sangurin var partur av savninum *Kannubjølluvísur* frá 1977. Sama ár, ella árið eftir, varð sangurin útgivin á plátu av Hjørdis Johansen og gentunum. Sangurin um nissumannin, ið leitar eftir mandluni í greytinum, gjørdist beinanvegin sera vælumtóktur millum føroysk børn, og hevur verið tað líka síðan.

*Lítla fitta nissa mín,*
*tú skalt fáa greyt í trygil tín,*
*jólagreyt við mandlu í.*
*Ja, so oysa vit uppí.*

*Anker Eli Petersen*




Kappróður á Ólavsøku 2005
Mynd: www.faroephoto.com

# Nýggj postgjaldsmerki 2010

Tann 20. september 2010 verða fýra nýggj postgjaldsmerki givin út. Hetta er triðja árið á rað at føroysk postgjaldsmerki verða givin út.

Myndevni í ár er kappróður og er tað listamaðurin, Jóannes Lamhauge, sum hevur teknað myndirnar.

Jóannes Lamhauge ynskir við tekningunum at fanga sálina í tí føroyska kappróðrinum og hevur valt nøkur motiv, sum hann heldur umboða kappróðrarandan best.

Fyrsta merkið ímyndar ein venjandi bát. Fólk hava ofta lyndi til at gloyma hvussu nógv venjing skal til í kappróðri. Allaroftast verður vant einar 6 ferðir um vikuna frá einaferð í februar, so tað er ikki at undirmeta.

Og so sjálvandi skal sjálvur kappróðurin við, har bátarnir allir liggja stavn um stavn og har ein næstan hoyrir Jógvan Arge fyri sær.

Triðja merkið umboðar stemningin í bátinum, soleiðis, at man sær andlitsbrøgdini á allari bátsmanningini, pínuna, og tann beinharða viljan, sum skal til fyri at vinna. Teir hvítnandi knúgvarnir, orkuna, sveittan og allan dramatikkin "armar orna, andlit rodna, spenna sterkar spengur...", sum kvøðið verður. Hetta motivið er tað ein sær við eygunum á róðursmanninum, ið situr afturi í rong og koyrir á.

Sjálvandi skal motivið av einum vinnarabáti eisini við, har manningin er á gosi eftir at hava vunnið róðurin. Tað slepst ikki undan, tí tað umboðar líkasum úrslitið og lættan aftaná alt stríðið.

Til ber at bíleggja stemplað og óstemplað postgjaldsmerki við fyrstadagsstempli ella vanligum dagstempli. Eisini fæst ein fyrstadagsbjálvi við øllum fýra postgjaldsmerkjum á.

Sum kundi og frímerkjasavnari kannst tú




sjálv/ur áseta virðið á postgjaldsmerkjunum. Tó kann ásetta virðið ikki vera lægri enn 6,00 kr og ikki hægri enn 100,00 kr.

**GG!**
Postgjaldsmerkini frá 2009 og tilhoyrandi vørur verða bert seld til og við 19. september 2010 (sí bíleggingarlepan).



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | Postgjaldsmerki 2010 |
| Útgávudagur: | 20.09.2010 |
| Virði: | 6,00 - 100,00 kr. |
| Myndevni: | Kappróður |
| Teknað: | Jóannes Lamhauge |
| Stødd: | 22,5 x 55,0 mm |
| Prentháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Post Danmark |



**Mjúk rósa**, *Rosa mollis*, er helst nærum burtur í føroysku náttúruni. Fyrsta skráseting av plantuni er frá 1893, og tá varð hon funnin í Vestmanna. Mjúk rósa veksur í homrum og í bakkum. Útbreiðslan av plantuni á norðaru hálvu er avmarkað til Evropa.
*Mynd: Anna Maria Fosaa*

# 2010 – Árið har plantu- og djóra-sløg skulu verjast

ST hevur valt 2010 at vera serligt verndarár fyri plantu- og djórasløg; men hóast Løgtingið fyri 16 árum síðani tók undir við altjóða avtalu um at varðveita lívfrøðiligt margfeldi og at gagnnýta hetta margfeldið burðardygt, er enn ongin føroysk ætlan gjørd hvussu hetta skal gerast.

**Verður nøkur náttúra eftir til komandi ættarlið?**
Henda spurning kunnu vit hóskandi seta, nú ST hevur lýst 2010 at vera altjóða ár fyri lívfrøðiligt margfeldi.

Endamálið við júst hesum altjóða árinum hjá ST er í stuttum:
- At varpa ljós á týdningin av lívfrøðiliga margfeldinum fyri okkara trivnað
- At steðga tapinum av lívfrøðiligum margfeldi, sum í løtuni hvørvur 100 ferðir skjótari enn natúrligt er
- At hátíðarhalda góð úrslit

**Týdningurin av at verja lívfrøðiliga margfeldið**
Lívfrøðiligt margfeldi ella *biodiversitetur*, sum tað eisini verður nevnt, merkir fjølbroytni í livandi náttúruni. Tað er fjølbroytni í vistskipanum, har plantur og dýr liva, fjølbroytni í plantu- og djórasløgum og fjølbroytni í teirra arvaeginleikum. Samanspælið millum plantu- og djórasløg er við til at varðveita javnvágina í heimsins vistskipanum.

Tað lívfrøðiliga margfeldið er grundarlagið fyri matinum, vit liva av. Ein stórur partur av heilivágnum, ið vit nýta, kemur beinleiðis ella óbeinleiðis frá lívfrøðiligum tilfeingi. Meginparturin av byggitilfari og tilfari til ídnað kemur frá lívfrøðiligum tilfeingi, og – ikki minst hevur lívfrøðiliga margfeldið stóran týdning fyri frítíðarvirksemi og ferðavinnu.

Føroyar tóku fyri 16 árum síðani undir við altjóða sáttmálanum um lívfrøðiliga marg-



feldi. Hetta var eitt tekin um, at vit vildu troyta okkara náttúrugivna tilfeingi burðardygt. Sum samfelag játtaðu vit, at náttúran framhaldandi skal vera ein týðandi partur av okkara mentan, ið gevur okkum íblástur til gerandisdagin, soleiðis at vit geva okkara børnum sama hepni, sum vit sjálvi og okkara forfedrar hava havt, at kunna búleikast her.

Men hóast vit í Føroyum liva tætt knýtt at náttúruni, eru vit ikki komin hartil enn, at vit hava sett út í kortið, hvussu hetta virðismikla tilfeingið skal gagnnýtast og verjast.

Sáttmálin er ein avleiðing av, at inntriv frá menniskjum á sjógvi og landi gerast størri, so hvørt sum fólkatalið í heiminum økist. Dálkingin gerst alsamt verri, og náttúruøki hvørva. Tí eru fólk um allan heim farin at óttast, at talið av plantu- og djórasløgum fer at minka ógvisliga, so hvørt sum sløgini doyggja út.

Hetta hevði við sær, at 155 lond í 1992 skrivaðu undir sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi (*Biodiversitetskonventiónina*) á ráðstevnu í Rio de Janeiro.

Eitt av endamálunum við sáttmálanum er at varðveita lívfrøðiliga margfeldið á jørðini og at tryggja burðardygga gagnnýtslu av livandi tilfeingi. Danska fólkatingið samtykti at góðkenna sáttmálan 21. november 1993, og Føroya Løgting samtykti 18. desember sama ár at taka undir við góðkenningini. Føroyar eru sostatt partur av sáttmálanum.

Fyrsta stigið á leiðini til at fylgja sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi var at fáa gjørt eina støðufrágreiðing um lívfrøðiligt margfeldi í Føroyum. Hendan frágreiðing kom út í bókini "*Føroya Náttúra*", sum Føroya Skúlabókagrunnur gav út í 2006.

Framhaldandi uppgávan at verja tað lívfrøðiliga margfeldið er at gera tjóðarætlanir



**Reyð várhagasólja,** *Taraxacum rubifolia*, er serføroysk. Hon er funnin fyrstu ferð í Tórshavn, men er ikki sædd tey seinastu árini. Reyð várhagasólja veksur í plantufrøðiliga urtagarðinum hjá Føroya Náttúrugripasavni. Hon er sermerkt við sínum myrkareyðu bløðum. Seinni á sumri gerast bløðini grøn. *Mynd: Anna Maria Fosaa*

fyri náttúruvarðveitslu, sum sáttmálin áleggur okkum. Í Føroyum er hetta arbeiði ongantíð sett í verk.

**Europa ger meira enn hini**

Tíggju ár eftir ráðstevnuna í Rio var ein ráðstevna í Johannesburg, har ásannað varð, at avgerðirnar á Rio ráðstevnuni í 1996 ikki megnaðu at steðga afturgongdini.

Í Europa er málið at tálma afturgongdini av lívfrøðiliga margfeldinum hægri raðfest enn aðrastaðni í heiminum, og endamálið er at steðga missinum í 2010 heldur enn bara at minka ferðina, sum tað hvørvur við.

Felagsmálið hjá Europa er at arbeiða fram ímóti hesum úrsliti, bæði við at fremja miðvísa lóggávu og avtalur og við at dagføra annan ES-politikk fyri at tryggja, at hann samvirkar til at koma á mál.

**Countdown 2010**

Hitt sonevnda *Countdown 2010* tiltakið lýsir sjey høvuðstættir í arbeiðinum at varðveit lívfrøðiliga margfeldi.

1. Minst 10% av øllum sløgum av vistskipanum skulu verjast, so náttúra og natúrlig landsløg verða varðveitt.

2. Landbúnaðurin eigur at fjálga um lívfrøðiliga margfeldið, t.d. við at víðka margfeldið í akurlandinum og minka nýtsluna av kunsttøðum og pestisidum.

3. Fiskastovnar eiga at verða gagnnýttir burðardygt. 75% av øllum fiskiskapi í heiminum í dag er ovfisking, og avoyðing hóttir longu mong sløg.

4. Bygging eigur at hava meiri fyrilit fyri at verja lívfrøðiligt margfeldi. Í løtuni oyðileggur nýggj bygging heimvistin hjá mongum djórum.



5. Veðurlagsbroytingar ávirka eisini náttúruna. Vit eiga at royna at vinna á broytingum, og vit eiga at tryggja møguleikarnar hjá livandi verum at flyta ella laga seg eftir nýggjum umhvørvi.

6. Summi fremmand sløg kunnu í ringasta føri gerast innræsin, soleiðis at tey hótta lokal sløg við oyðing. Vit eiga at royna at forða hesum sløgum í at breiða seg.

7. Lívfrøðiliga margfeldið er støðið undir burðardyggari menning. Tí er neyðugt at samskipa eftirlitið við lívfrøðiliga margfeldinum og samskipa politisku avgerðirnar á økinum.

**54 fuglasløg og 74 plantusløg í vanda**

Eitt nýtt yvirlit yvir fuglar og plantur ið er gjørt eftir reglum hjá altjóða náttúrufriðingarstovninum IUCN, vísir, at í Føroyum eru 54 sløg av fuglum og 74 sløg av plantum í vanda fyri at doyggja út. Nøkur sløg eru longu útdeyð, og summi eru so illa fyri, at um ikki okkurt munagott verður gjørt, er teimum ikki lív lagað.

Eitt tílíkt yvirlit verður kallað ein reyðlisti. Tað er ein meting av, hvussu stórur vandin er fyri, at ávísar plantur og ávís djór doyggja út.

At djór og plantur doyggja út, er einki nýtt, og tað er ein partur av natúrligu gongdini á jørðini. Hesar seinnu øldirnar er tað tó soleiðis, at virksemið hjá menniskjum hevur ført við sær, at plantur og djór doyggja út í sera stórum tali.

Fyritreytin fyri yvirhøvur at kunna gera ætlanir um at reyðlista plantur og djór er, at vit viðurkenna, at plantur og djór doyggja út av mannaávum. Síðan mugu vit finna orsøkirnar til, at plantur og djór hvørva og so royna at steðga gongdini eftir førimuni.

*Anna Maria Fosaa*

# Vel ársins vakrasta frímerki 2009

## - og verð við í kappingini um frálíkar vinningar !



FO 651-658



FO 659-660



FO 661-666



FO 659



FO 660



FO 667



FO 668



FO 673



FO 674



FO 672



FO 669



FO 670



FO 671



FO 675


FO 676

# Høvuðsvinningur frá Guðrun & Guðrun





Hesa ferð hava vit valt at høvuðsvinningurin skal vera ein troyggja frá Guðrun & Guðrun. Hetta er ein av vælumtóktu troyggjunum við merkinum á aðrari ermuni.

Flestu vørur teirra eru bundnar við hond úr reinari ull. Kvinnur úr Føroyum og Jordan binda troyggjurnar.

Aftaná bert fá ár í mótaheiminum hava Guðrun & Guðrun verið at sæð í mótablaðnum Vogue, latið heimskendar kvinnur sum Naomi Campbell og Helenu Christensen í, fingið vitjan av Bill Clinton, latið upp framsýningar í New York og Milano og økt teirra umsetning frá 600.000 kr. í 2006 til 5 milliónir kr. í 2008.

Les meira á: www.gudrungudrun.com

1. vinningur: troyggja frá Guðrun & Guðrun







3. vinningur: hálsprýði úr horni



2. vinningur: vovið turriklæði úr føroyskari ull

4.-10. vinningur: serprent við tekningum af føroyskum mati

Klipp lepan út og send okkum hann ella send ein teldupost til stamps@posta.fo við viðmerkingini: "Ársins frímerki 2009". Seinasta freist at atkvøða er 1. august 2010!

Navn: ____________________

Tilskrift: ____________________

____________________

____________________

T-postur: ____________________

Kundanr.: ____________________

**Ársins frímerki 2009 er:**

# Nýggjar frímerkjaútgávur - september 2010




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jens Christian Svabo** |
| Útgávudagur: | 20.09.2010 |
| Virði: | 6,00, 12,00, 14,00 og 22,00 kr. |
| Nummur: | FO 692-695 |
| Frímerkjastødd: | 42,00 x 30,45 mm |
| Snið: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset + stálstik |
| Prentsmiðja: | Joh. Enschedé, Holland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, miðal- og stórbrøv til Evropa, 0-50 g, og miðalbrøv til onnur lond (B-brøv) |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Epli og røtur** |
| Útgávudagur: | 20.09.2010 |
| Virði: | 6,00 og 8,00 kr. |
| Nummur: | FO 696-697 |
| Frímerkjastødd: | 24,75 x 45,00 mm |
| Snið: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smá- og miðalbrøv, 0-50 g |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jólasangir 1** |
| Útgávudagur: | 20.09.2010 |
| Virði: | 6,00 og 10,00 kr. |
| Nummur: | FO 698-699 |
| Frímerkjastødd: | 26,5 x 42 mm |
| Snið: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offset + silver metallic og gloss varnish |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og smábrøv til Evropa, 0-50 g |

Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: Centraltrykkeriet, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo